NORÐOYA SPARIKASSI

# Roknskapur 1. hálvár 2002 hjá Norðoya Sparikassa

Norðoya Sparikassi hevði eitt úrslit áðrenn skatt upp á 12,2 mió.kr. fyrra hálvár 2002. Hetta er 1 mió.kr. betur enn fyrra hálvár 2001, tá úrslitið var 11,2 mió.kr.

## Inntøkur

Netto rentuinntøkurnar fyrra hálvár vóru 25,5 mió.kr. móti 24,6 mió.kr. sama tíðarskeið í 2001. Hetta er ein vøkstur uppá 0,9 mió.kr. ella 3,7%. Netto kostnaðarinntøkurnar eru eisini hækkaðar nakað, til 26,7 mió.kr. Rentan á 1. veðrætti lækkaði seinasta heyst úr 6,5% niður í 5%, og er hetta heldur meiri enn lækkingin á rentustøðinum annars. Hetta kemst av, at inntøkurnar frá tænastugjøldum eru alsamt vaksandi og roknast kann við, at henda gongdin fer at halda fram.

## Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk og umsiting eru hækkaðar við 1,2 mió.kr. úr 11,7 upp til 12,9 mió.kr., svarandi til ein vøkstur uppá 10,3%. Høvuðsorsøkin er meirvirðisgjaldið á tænastunum frá P/F Elektron. Eftir at føroysku peningastovnarnir fingu viðhald í Føroya Rætti, fall dómur í Eystara Landsrætti í fjør heyst, sum hevði við sær, at fult meirvirðisgjald skal roknast av øllum tænastum frá P/F Elektron. Sannlíkt er, at málið eisini kemur fyri í Hægsta Rætti. Annars eru útreiðslurnar fyrra hálvár 2002 0,4 mió.kr. meira enn tær vóru í 2000, tá tær vóru 12,5 mió.kr.

## Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar

Avskrivingar og burturleggingar móti tapi av útlánum og ábyrgdum vóru 2,1 mió.kr. móti 3,3 mió.kr. í 2001. Sparikassin hevur sum mál at reka ein varnan útlánspolitik, og í dag eru 3,9% av samlaðu útlánunum og ábyrgdunum sett av ímóti tapi upp á skuldarar.

## Fíggjarstøða

Fíggjarstøða sparikassans javnvigar við 1.060 mió.kr. í mun til 1.005 mió.kr. sama tíðarskeið í fjør, ið svarar til ein vøkstur uppá 55 mió.kr. ella 5,5%. Innlánsvøksturin er 4,0% ella 32 mió.kr., meðan útlánsvøksturin er 101 mió.kr. ella 15,9%. Eginpeningur sparikassans er seinasta árið øktur við 20,7 mió.kr. ella 10,8% og er nú 213 mió.kr.

## Gjaldføri

Gjaldføri sparikassans er sera gott. Kassapeningur, ogn hjá peningastovnum og lánsbrøv vóru hin 30. juni 302 mió.kr. móti 353 mió.kr. somu tíð í fjør.

## Solvensur

Solvensur sparikassans er framvegis høgur og var hin 30. juni í ár 30,1% móti 31,8% somu tíð í fjør. Lógin krevur ein solvens upp á 8%.

## Útlit seinra hálvár

Sparikassin er sera væl nøgdur við úrslitið fyrra hálvár og roknað verður við, at úrslitið seinra hálvár verður áleið tað sama.